# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Aðalorðaskifti um føroyska málið

Aðalorðaskiftið á tingi í dag um málpolitikkin er einki minni enn ein mentanarpolitisk stórhending. At fáa Føroya mál til æru og tryggja málinum pláss sum høvuðsmáli í Føroyum er eitt endamál, sum gongur heilt aftur til tjóðskaparrørsluna. Við tíðini er móðurmálið vorðið høvuðsmál okkara, og tað man vera sjálvsagt fyri øllum føroyingum, at móðurmálið nú verður brúkt í at kalla øllum lívsins viðurskiftum. Verður málið ikki brúkt, so eru tað praktiskar og ikki løgfrøðiligar ella politiskar forðingar, ið eru orsøkin.

Hóast málið hevur fingið alla viðurkenning, so merkir hetta ikki, at allar súðir eru syftar, og at alt er gott, sum tað er. Málið er fyritreyt fyri øllum samskifti, málið er okkara samleiki. Málsligur førleiki at lurta, tala, lesa og skriva er grundarlag undir øllum samfelagsligum virksemi, fólkaræði og allari samveru manna millum. Samstundis er vantandi málførleiki mangan orsøk til, at omanfyrinevndu viðurskifti ikki virka, sum tey skulu. Nakað soleiðis tekur landsstýriskvinnan til í sínum framløguriti. Her munnu vit øll vera samd, men so er annars smátt við semjuni, tá um mál og málrøkt ræður.

Eitthvørt móðurmál skal røkjast og mennast. Øll heimsins tungumál broytast, eru undir trýsti og taka orð og vendingar úr øðrum málum. Hetta er eitt øki, har vit føroyingar eru sera ósamdir um málpolitikkin. Vit eru ósamd um mangt annað málinum viðvíkjandi, men vit eru samd um at tryggja uppvaksandi ættarliðum teir bestu málførleikar fyrst og fremst við atliti at móðurmálinum, men eisini tá talan er um fremmandamál.

Hetta merkir, at vit eiga at seta fokus á málfrálæruna í dagstovnum so væl sum í fólkaskúlanum. Hetta er júst eitt av fokuspunktunum í framløguni hjá landsstýriskvinnuni. Har verður undirstrikað, hvussu stóran týdning tað hevur, at námsfrøðingar so væl sum fólkaskúlalærarar hava dyggar málførleikar og er hetta nú tryggjað í nýggju pedagog- og læraraútbúgvingunum. Málpolitisku tilmælini snúgva seg eisini um ítøkilig tiltøk at menna málførleikar í fólkaskúlanum, og hetta er sera skilagott, og tað er sjálvandi her, vit skulu byrja.

Men málpolitikkur er annað og meira – um rættskriving, um gott og um minni gott mál, nýtslu av fremmandaorðum oa. Okkum tørvar eitt opið og fordómsfrítt orðaskifti um hendan part av málpolitikkinum, og okkum tørvar eina brúkaravinarliga og fordómsfría ráðgeving fyri øll júst á hesum øki.

Málpolitikkálitið, Málmørk, nemur eisini við málið í fjølmiðlunum. Hetta fegnast vit um. Móðurmálið er týdningarmesta amboðið í dagliga virki okkara, sum arbeiða við fjølmiðlum. Er amboðið ikki í lagi, so verður framleiðslan hareftir. Her er tørvur á ráðgeving og eftirútbúgving og vónandi verða hesi millum tey tilmæli, ið Løgtingið fer at raðfesta. Sakkunnleikin hevur nú talað, tilmælini liggja á tingborði, og tað er nú í hondum Løgtingsins at tryggja føroyingum, at móðurmálið fær bestu kor, soleiðis at vit standa dubbað við teim bestu málsligu førleikum og harvið við einum sterkum samleika í eini tíð, har altjóðagerðin hevur sína sterku ávirkan á alt og øll.

**Sosialurin**

# Kommunur fíggjarstýra generelt betur enn landið: Kl. Kommuna vent 50 mill. hall í 2008 til avlop í 2009



**GUNVÁ VIÐ KELDU**
Borgarstjóri í Klaksvíkar Kommunu og næstforkvinna í KSF

**Tað er rætt, sum Landsbankin førir fram í forsíðugrein í Dimmalætting, at tí almenna tørvar eina langtíðar fíggjarstýring, men tað er als ikki rætt at geva kommununum líka ringt skoðsmál sum landskassanum – har er stórur munur á fíggjarstýringini**

Í týsdagsdimmuni hesa vikuna var høvuðsgreinin á forsíðuni ein útmelding frá Landsbankanum, við Sigurði Poulsen, landsbankastjóra, har m.a. varð ført fram, at "*fleiri álvarslig lýti mugu rættast, bæði fyri land og kommunur, skal búskapurin kunna stýrast við skili*", og "*at fíggjarliga regluverkið er ófullfíggjað og ótíðarhóskandi*".

### Hugburðsbroyting heldur enn regluverk

Í einum áliti, sum nevnda grein í Dimmalætting umrøður, verður róð framundir, at landsstýrið skal gera reglugerðir fyri: (1) at útreiðslu- og íløgukarmar skulu gerast fyri fleiri ár í senn, (2) at krevja javnvág í rakstrinum yvir eitt áramál, (3) at krevja, at óvæntaðar inntøkur heilt ella lutvíst skulu í grunn ella til gjald av skuld, og (4) at krevja mál sett fyri, hvussu almenna skuldin skal vera.

Tað er neyvan nakar, sum er ósamdur við landsbankastjóranum í tí, at okkum tørvar at hava ein munandi meira langsiktaðan fíggjarpolitikk hjá tí almenna – bæði land og kommunur.

Men harvið er ikki sagt, at reglugerðir og regluverk fara at loysa henda trupulleika, tí eingin skipan er frægari enn fólkini, ið umsita hana, og í botn og grund er hetta ein spurningur um hugburð og at hava eina politiska skipan, ið hevur styrki til at stýra, bæði í góðum og ringum tíðum.

### Fólkaræði heldur enn embætisvald

Omanfyri nevndu mál ljóða øll sera væl, og eg kann eisini taka undir við nøkrum teirra – eitt nú at land og kommunur á politiskum støði hava árligar samráðingar um tann yvirskipaða útreiðslu- og íløgukarmin fyri bæði land og kommunur – men samstundis stúri eg fyri, hvat úrslitið verður, um ein eftirlitisstovnur verður settur yvir kommunurnar, sum fær heimild til at seta øll omanfyri nevndu krøv til kommunurnar.

Vit hava í dag eina aldargamla fólkaræðisliga skipan, har tey fólkavaldu fjórða hvørt ár standa til svars yvir fyri veljararunum fyri sínar avgerðir ella mangul av sama.

Sjálv haldi eg, at grundleggjandi er tann skipanin tann besta av øllum til at regulera hesi viðurskifti, samstundis sum eg kann taka undir við einari felags, yvirskipaðari karmstýring av útreiðslunum.

Men her er neyðugt eisini at ávara ímóti, at vandi skjótt kann verða fyri einari bureaukratiskari skipan við tungum regluverki, umsiting og eftirliti, har embætisfólk í starvi hjá landinum útinna eftirlit við teimum fólkavaldu kring landið alt.

Av royndum vita vit, at slík eftirlit hava lyndi til at fara út í smálutir, soleiðis at tann frælsa fólkavalda skipanin verður bundin óneyðuga nógv niður.

Tá heldur eitt frælst fólkaræði við ábyrgd, har tann fólkavaldi, umframt lógarkarmarnar, stendur til svars yvir fyri veljarunum, enn eitt sentralstýrt embætisvald við tungum mannagongdum, har veljarin als ikki kemur til orðanna.

### Kommunurnar tillaga seg skjótari

Tað er sjón fyri søgn í dag, at tær føroysku kommunurnar samanumtikið duga og megna betur at reagera og tillaga sín búskap til galdandi umstøður.

Sum eitt fekst dømi um hetta kann eg nevna, at Klaksvíkar Kommuna upp á sera stutta tíð hevur megnað at tillagað sín búskap til nógvar broyttar og verðsnaðar umstøður.

Sum kunnugt varð Klaksvíkar Kommuna á heysti í 2008 – vegna eina kombinatión av manglandi fíggjarstýring og inntøkuniðurgongd – rakt av kreppu og likviditetstroti, sum setti stór krøv til politisku skipanina í býráði og nevndum.

Hesa avbjóðing tók býráðið í størsta álvara og setti neyðug tiltøk í verk, við tí úrsliti, at kommunanr megnaði at venda einum halli á 52,5 mill. í 2008 kr. til eitt avlop í 2009.

Tí er tað misvísandi, so sum landsbankastjórin í hesum føri ger, at koyra kommunurnar í sama sekk sum landið, sum í ár framvegis stríðist við næstan milliarda hall, meðan kommunurnar samanumtikið hava megnað hetta nógv betur.

Tá ið ein landskassi er í tí støðu, sum føroyski landskassin í dag er í, er skjótt til at seta í verk broytingar í panikki við alskins reglugerðum, har farið verður út í ítøkiligar smálutir fyri, hvussu arbeiðast skal, eitt nú úti í kommunum kring landið.

Givið er, at langtíðarætlanir eru alneyðugar fyri at mótarbeiða óneyðugum sveiggjum í búskapinum. Land okkara er somikið avmarkað í støðd, at tað letur seg væl gera at fíggjarstýra við skili, eitt nú við at gera yvirskipaðar avtalur um útreiðslukarmar, uttan at farið verður út í eitt detaljueftirlit við fólkavaldu skipanini.

### Innsent tilfar

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.